

Andreas F. Hansen

# Viðmerkingar til samrøðu í Degi & Viku 27. des. við Kaj Leo Johannesen

*Kaj Leo Johannesen (KLJ) úttalar millum annað, at fiskivinnan/flakavinnan hevur strukturellar trupulleikar*

**Flakavinnan**

Av teimum tíggju størstu aktørunum í flakavinnuni eru tvey feløg, sum hava havt hall seinastu 2 árini, Faroe Seafood og Maru Seafood. Tvey feløg, sum gjørdu risastórar, ábyrgdarleysar íløgur í skip/loyvi. Bæði feløgini fóru á húsagang, og nógv fólk blivu arbeiðsleys.

Hini átta virkini/feløgini hava havt avlop uppá 15,9 mio/2008 og 28,8 mio/2009. Tey hava havt 568 fólk í starvi og hava útgoldið lønir uppá 107,5 mio/2008 og 116,5 mio/2009. Viðmerkjast skal, at Kósin/Klaksvík er latið uppaftur og útvið 100 fólk eru í arbeiði.

Tá skal havast í huga, at virkini kundu arbeitt væl meira, um rávøra hevði verið til tess. Hetta eru alt feløg/virki sum eru uttan fyri høvuðsstaðarøkið og sum hava sera stóra ávirkan á lokalsamfeløgini.

Omanfyrinevndu avlop ljóða kanska ikki av nógvum, men prógvar tó, at tað gongur tann rætta vegin, og at tær rationaliseringar og íløgur, sum eru gjørdar seinastu árini, vóru rættar.

Tí undrar tað meg stórliga, at KLJ og flokkur hansara vilja taka grundarlagið undan flakavinnuni við at loyva skipum at landa óavmarkað uttanlands. Tilfeingið er ogn føroya fólks, og tí eiga føroysk feløg/virki sjálvandi rættin til at kunna bjóða upp á alt, sum verður fiskað av føroyskum skipum í føroyskum øki.

Hví skulu útlendingar fáa ræðið yvir okkara tilfeingi og virka tað fram um okkara arbeiðsmegi?? Er KLJ greiðir yvir, hvørjar avleiðingar hetta kann føra við sær? Vit hava longu eitt arbeiðsloysi oman fyri 8% aftan á húsagangin hjá Faroe Seafood, og um KLJ og Sambandsflokkurin vil avreiða okkara tilfeingi til útlendingar, so verður arbeiðsloysið skjótt oman fyri 10%. Tað vil sjálvandi føra til fráflyting og lækkandi inntøkur til landskassan.

Allur føroyskur fiskur eigur at vera landaður í Føroyum. Fiskurin kann handlast/seljast úr Føroyum til keyparar í Føroyum og uttanlands. Tað verður gjørt í Noreg og Íslandi, hví ikki her??

**Fiskivinnan**

Línuflotin og partvís eisini partrolaraflotin hava trupulleikar at bera seg fíggjarliga. Skipini hava ov fáar fiskidagar og hví er so?? Hetta tí at politikarar hava loyvt øktum veiðutrýsti og hava útskrivað loyvi í vinarog kenningar politikki. Av tí sama hava skipini í dag ov fáar dagar, og ongin fær nakað burtur úr fíggjarliga; hvørki reiðarí ella manning.

Talið av fiskiskipum er ov høgt og má minkast soleiðis, at teir, ið koma at fiska framyvir, kunnu fiska burðardygt við vinningi og manna skipini við føroyingum.

**Útlendskan kapital**

Hví er tað neyðugt við útlendskum kapitali í føroyskari fiskivinnu? Hví er neyðugt at avreiða okkara høvuðsvinnu til útlendingar? Hevur KLJ ikki álit á, at føroyskt vinnulív klárar at reka okkara høvuðsvinnu? Hygg rundan um okkum! Hini fiskivinnulondini loyva ikki útlendskum kapitali at keypa kvotur; hví skulu vit!!

Eg haldi, at alt ov lítið skil er í nógvum útsagnum viðvíkjandi okkara høvuðsvinnu frá politiskari síðu. Eg eri bangin fyri, at tað botnar í manglandi vitan, og at ov nógvir politikarar einans hugsa um fiskivinnuna á sjónum. Fiskivinnan á landi hevur eins stóran týdning fyri okkara samfelag.

**Gott nýggjár**



Sirið Stenberg

# Uppsagnir á Suðuroyar Ellis og Røktarheimið

Gávur skulu betalast aftur er heiti á bók hjá Firus Gaini. At so er, er sjón fyri søgn nú uppsagnirar á Suðuroyar Ellis og Røktarheimið eru við at blíva til veruleika.

Suðuroyggin skuldið "fáa"áleið 60 størv í samband við at nýtt ellisheim skuldi byggjast í Vági. Tað var eins og lovaða landið var fyri stavn, ongin endi var á hvussu gott alt skuldi blíva. Arbeiði skuldi vera til allar hendur, og sjálvt barnagarður bleiv nevndur sum ein møguligur "vinningur" av tí heila, nú kommunurnar komu at fáa so nógvan skatt inn ! Á jú, vit skuldu sjálvi gjalda heimið, og so líka flyta ein skúla, men tað var onkið í mun til hvat vit komu at "fáa"

Alt hetta mál hevur elvt til stórar ósemjur, serliga í Vági. Nú ellisheimið hjá kommununum í sunnaru helvt er um at vera liðugt, og skúla-ellisheimsruðuleikin tíbetur er um at leggja seg, so spælir ABC-samgongan enn ein jokara út í spælið. Nú er knappliga neyðugt at niðurleggja fleiri røktarheimspláss á Suðuroyar Ellis og Røktarheimið í samband við sparingar, og omaná hetta hevur verið frammi at nýggja ellisheimið hjá kommununum í sunnaru helvt møguliga ikki opnar við fullum kapasiteti ?

Somu løgtingslimir sum "lótu" okkum eitt ellisheim, hava nú tikið undir við skerjingum á eldraøkinum í suðuroynni, grundað á at størvini nokk koma aftur á nýggja heiminum í Vági. Spennandi verður at gera upp hvussu høgt starvsfólkatalið í eldrarøktini verður tá ið alt kemur til alt....

So jú, gávur skulu betalast aftur. Fyrsta rokningin er nú komin. 14 starvsfólk vera nú so ella so rakt av sparingunum á Suðuroyar Ellis og Røktarheimið. Framferðarhátturin í samband við tilgongdina fram móti uppsøgnunum hevur verið alt annað enn mjúku, hetta er lýst fleiri ferðir í fjølmiðlunum, t.d hevur sálarfrøðingur sammett hendan við tortur, í eini grein á Suðurrás, umframt at starvsfólkini hava gjørt vart við seg. Tað talar fyri seg.

Nú fara øll í frustratión at leita eftir onkrum at ábyrgda fyri hetta. Ábyrgdina eigur bert tann politiski myndugleikin, minnist til tað ! Hvar eru tit nú sum lovaðu okkum øll hesi arbeiðsplássini ?? Tit sum vóru so góð við Suðuroynna, og hildu ABC-loysnina vera einasta ABC´ suðringum tørvaði

Veljarin dugir sítt ABC, so eg vóni veljarin betalir tykkum gávurna aftur !

Henrik Søderstrøm Nielsen
*Kvívík*

# Løgtingsmaður hálva tíð...

Det er særdeles velkomment, at Gerard Lognberg har offentligt bekendtgjort at lagtingsarbejde er 1/2 tids arbejde, til fuld løn.

Der er forhåbentligt flere der husker begrundelserne, hos et enstemmigt lagting, da de forhøjede deres egen løn, helt betydeligt for en del år siden.

Begrundelsen dengang var at det skulle være fuldtidsarbejde, at være lagtingsmand.

Nu ved alle færinger at der er beskærelser alle steder, i samfundet og der er blevet sparet helt ind på benet.

Det havde derfor været helt passende med en lønnedgang på 50% for lagtingsmænd, det er jo 1/2 dags arbejde. ???

Hvordan skal vælgerne få tillid til et så ligegyldigt parlament, der bare misbruger de offentlige midler.

**NB.** Få sat et stempelur op i tinghuset og betal så løn efter opmødning i sandkassen.

Godt lagtingsvalg, når det engang kommer.